Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# 20 av teimum størru – EGINOGN & STARVSFÓLK

**"Fyri at meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina"**

# Innihaldsyvirlit

Um frágreiðingina ... 3

Endamál ... 3

Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017 ... 3

Fíggjarfeløg ... 3

Avmarkingar og frávik ... 3

Tey útvaldu lyklatølini ... 4

Eginogn ... 6

Samlað eginogn ... 8

Starvsfólk ... 9

Lyklatøl ... 10

Fyrivarni ... 11

# Um frágreiðingina

## *Endamál*

Endamálið við gjøgnumgongdini er at lýsa ta fíggjarligu gongdina, gongd og kós, sum tey størstu føroysku feløgini hava havt í tíðarskeiðnum 2013 - 2017.

Hetta verður gjørt við at hyggja at útvaldum lyklatølum og at samanhalda hesi við undanfarin ár, og í ávísum førum, eisini við gongdina í útlandinum.

## *Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017*

Greiningin er gjørd við støði í almennu ársfrásøgnunum fyri 2013 – 2017. Tey útvaldu feløgini upplýsa umsetningin í ársfrásøgnini hjá felagnum, og ið fleiri førum er talan um ein samtaksroknskap.

Í frágreiðingini eru 20 feløg vald út, sum hava størsta umsetning í tíðarskeiðnum 2013 – 2017.

Greiningin fevnir sostatt ikki um feløg, ið ikki upplýsa umsetningin.

## *Fíggjarfeløg*

Fíggjarfeløg og peningastovnar eru ikki við í greiningini.

## *Avmarkingar og frávik*

Fyrsta roknskaparár hjá P/F Pelagos var fyri tíðarskeiðið 27/1 – 31/12-2014 og er sostatt ikki fyri eitt heilt ár. Felagið er sostatt ikki við í tølunum fyri 2013.

Allar fyritøkurnar, ið eru við í greiningini, hava álmanakkaárið sum roknskaparár.

Roknskaparhátturin hjá teimum ymisku feløgunum kann verða ymiskur, eins og tað eisini eru munir millum virksemisøkir, sum viðføra, at ein beinleiðis samanbering ikki er gjørlig. Tað eru ikki gjørdar tillagingar fyri serlig virksemis- ella vinnugreinaviðurskifti.

Gjøgnumgongdin er gjørd við útgangsstøði í umsetningi. Tølini eru fingin til vega frá Vinnuvitan.Biz og eru alment atkomilig.

## *Tey útvaldu lyklatølini*

Hetta er fjórða frágreiðingin í eini røð. Fyrsta frágreiðingin viðgjørdi umsetning, onnur frágreiðingin viðgjørdi rakstraríkast, og triðja frágreiðingin viðgjørdi íløgur og skuld. Eftir hesa frágreiðingina, sum umrøður íløgur og skuld, er ætlanin at koma við øðrum frágreiðingum, sum fara at viðgera onnur útvald lyklatøl. Ætlanin er, at tá ið allar frágreiðingarnar eru almannakunngjørdar, eru hesi lyklatøl viðgjørd:

- Umsetningur
- Vinningur
- Íløgur
- Skuld
- Starvsfólk
- Eginogn

Røðin fer at enda við einari samlaðari frágreiðing, sum tekur samanum.

Ætlanin er síðani, árliga at dagføra frágreiðingarnar soleiðis, at frágreiðingarnar kunnu lýsa fíggjarligu gongdina og kósina hjá teimum størstu føroysku feløgunum.

Tey feløgini, ið eru við í greiningini, eru nevnd á næstu síðu.

## Eginogn

Hjá 19 av teimum 20 feløgum øktist eginognin í 2017. Í 2016 vóru tað eisini 19 feløg, har eginognin øktist. Meira enn helmingurin av fyritøkunum, hava øll árini økt eginognina.




(fig. 1.1: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tí inngongur felagið ikki í 2013 ella 2014 í talvuni omanfyri. P/F Tjaldur gjørdi ikki konsernroknskap í 2012, og er tí heldur ikki við í 2013)

| Størst vøkstur í eginogn 2017 | Vøkstur |
|---|---|
| FAROE SHIP | 311,7% |
| PELAGOS | 60,8% |
| FRAMHERJI | 23,6% |

Faroe Ship hevði størstu økingina í eginognini í 2017, sum var 311,7%. Samlað fyri øll 20 feløgini í 2017 er talan um eina hækking uppá 10,9%. Í 2016 var hækkingin í eginognini 25,6%.

Tað skal viðmerkjast, at Faroe Ship broytti roknskaparhátt í 2017, ið hevði týðandi ávirkan á eginognina.

Samlaða eginognin hevði ein støðugan vøkstur í tíðarskeiðnum 2013 – 2015 uppá 14,6% - 16,5% árliga. Í 2016 var vøksturin munandi størri uppá 25,6%, men í 2017 lækkaði vøksturin til 10,9%

Niðanfyri standandi strikumynd vísur lutvísu broytingarnar í eginogn hesi árini.



## Samlað eginogn

Í tíðarskeiðnum í 2013 – 2017 er samlaða eginognin økt úr 5,7 mia.kr. til 10,6 mia.kr.




Samlaða eginognin fyri tey 20 feløgini var í 2017 10,6 mia.kr. (2016: 9,5 mia.kr.). Samlaði vøksturin í eginognini var í 2017 10,9% (2016: 25,6%)

| Gongdin í eginogn, samlað | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| Eginogn (mia.) | 9,5 | 10,6 |
| Samlaður vøkstur | 25,6% | 10,9% |

## Starvsfólk

Talið av Starvsfólkum/ársverkum skal takast við fyrivarni, tí tað kann vera ymiskt, hvussu feløgini gera ársverkini upp.

Tal av ársverkum hevur í tíðarskeiðnum 2013 – 2017 ligið millum 3.385 og 4.181. Talið av ársverkum var í 2017 4.058, í 2016 var talið av ársverkum 3.929.




(fig. 1.4: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tí inngongur felagið ikki í 2013 í talvuni omanfyri).

Vøksturin í ársverkum var í 2013 uppá 8,9% og øktist í 2014 við 14,4%. Í tíðarskeiðnum 2015 – 2016 var vøksturin negativur, soleiðis at í 2016 var talan um lækking á -6,0%. Í 2017 broyttist gongdin aftur til ein vøkstur uppá 3,3%.



## Lyklatøl

Í undanfarnum greiningum, sum eru kunngjørdar á www.januar.fo undanfarnu vikurnar, eru millum annað umsetningur, EBIT og ársúrslit. Niðanfyri er ein samandráttur gjørdur, har ið hugt verður eftir, hvussu nógv umsetningur, EBIT og ársúrslit er pr. ársverk.

Vit skulu minna á, at tølini skulu takast við fyrivarni, tí tað er ymiskt, hvussu feløg rokna ársverk.

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ársverk** | 3.385 | 3.873 | 4.181 | 3.929 | 4.058 |
| **Umsetningur pr. ársverk (t.kr.)** | 2.991 | 2.926 | 2.873 | 3.172 | 3.265 |
| **EBIT pr. ársverk** | 474 | 503 | 462 | 788 | 473 |
| **Ársúrslit pr. ársverk** | 386 | 371 | 387 | 659 | 387 |

Í talvuni omanfyri framgongur, at tølini eru rímiliga støðug, tó við undantakið av EBIT og ársúrslit pr. ársverk í 2016.

Umsetningur pr. ársverk hevur í tíðarskeiðnum ligið í talstrekkinum t.kr. 2.873 – 3.265.

EBIT pr. ársverk var í tíðarskeiðnum 462 – 503 (t.kr.), tó við undantakið av 2016, tá ið tað lá á 788 t.kr.

Ársúrslit pr. ársverk var í tíðarskeiðnum t.kr. 371 – 387 , tó undantikið 2016, tá ið ársúrslit pr. ársverk var t.kr.659



## Fyrivarni

Greiningin er gjørd sum ein almenn frágreiðing um viðurskifti, ið kunnu hava áhugað, og ikki sum yrkisráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá teimum upplýsingum, sum eru í greiningini, uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, hvat viðvíkur rættleikanum í greiningini.